# Føroyskt handver

**Øsingin er sera áhugaverd, tí hon vísir, at tað innan føroyskt handverk mestsum er bannað at læra hvønn annan nakað. Tað halda kvinnurnar í umstríddu dómsnevndni, sum noktaði at lata 1. virðisløn í Føroya størstu klædnakapping herfyri**



## Mentan



**Anna Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

„Dómsnevndin hevur valt onga 1. virðisløn at lata ..."

Stummi skelkurin stóð málaður í gapandi andlitunum. Fá sekund seinni var tað, sum hevði onkur slept eini bumbu millum teir 400 alspentu áskoðaranir á klædnakappingini hjá Gluggaglæmu í Müllers Pakkhúsi leygardagin. Í øgiligu málageipanini hoyrdi ongin restina av setninginum hjá frásøgumanninum. Og runt um í hølinum vóru vónbrotnir og illir sniðgevar longu í ferð við at taka síni pløgg niður, sum tær síðani rýmdu við.

Brádliga var tað, sum skuldu vera framsýningin av okkara fremsta handverki í løtuni, umskapað til eina leivd av onkrum, sum einaferð var.

Líka síðani hava atfinningarnar heglað niður yvir dómsnevndina

„Dómararnir áttu at fingið eitt reint 13 tal fyri niðurgering av folki" fýsti onkur í einum netkjaki

„Óluksáliga synd í teimum, sum luttóku í kappingini", suffaði ein annar, meðan ein triði bjóðaði heldur poetiskt inn at „Tað var sum sólin fór burtur og tað gjørdist ísakalt í Pakkhúsinum"

### Áhugaverd øsing

Føroya mest umstrídda dómsnevnd í løtuni hevur fylgt hvassa kjakinum. Men hvørki Katrina í Geil, master í design, Katrin Bonde, teaturskraddari, ella Anna Mortensen, onnur av fyrrverandi eigararnum av klædnafyritøkuni PAU, hava timburmenn eftir hendingina leygardagin.

Heldur tvørturímóti. Faktiskt umhugsaðu tær bara at lata eina 3. virðisløn og onga 2. virðisløn. At lata eina 1. virðisløn var ongantíð uppá tal.

- Vit høvdu tikið akkurát somu avgerð, um vit skuldu gjørt tað umaftur, og kunnu standa hundrað prosent inni fyri hvørjum orði í viðmerkingunum, sum vit góvu avrikunum, sigur Anna Mortensen.

Katrina í Geil skoytir uppí, at hon í grundini heldur tað vera rættiliga áhugavert, at avgerðin hevur øst fólk so nógv.

- Hetta vísir, at føroyskt handverk sum fak onga siðvenju hevur í at taka ímóti kritikki. Í viðmerkinginum blíva fólk við at minna á, at luttakaranir hava lagt alla sína tíð, orku og hjartablóð í at skapa hesi pløggini. Har má eg bara siga „sjálvandi! tí tað krevst onki minni" Og ofta er tað heldur ikki nóg mikið til at skapa eitt plagg, sum skarar framúr.

Eisini Katrin Bonde hevur grundað yvir, hvat tað er, sum hevur skapt ógvusligu reaktiónirnar.

- Ein orsøkin er uttan iva, at føroyskt handverk er eitt fak, har øll halda seg duga. Tí verða tey, sum veruliga duga, ofta fatað sum arrogant. Úrslitið er, at hetta er eitt øki, har tað mestsum er bannað at læra hvønn annan nakað. Og tað er stórt spell, tí tað blívir ongin dugnaligari av.

Anna Moretensen nikkar og minnist eina viðmerking tær fingu á framsýningini, sum undraði hana stórliga.

- Ein kom yvir og brigslaði okkum at royna at praktisera jantelógina, so ongin av luttakaranum skuldi halda seg vera nakað. Eftir mínum tykki er tað beint øvut, har tað meir er dómsnevndin, sum her er offur fyri jantelógini. Hóast vit hava bæði útbúgving og drúgvar royndir í fakinum, skulu vit eftir øllum at døma ikki ditta okkum til at meta um, hvat er gott og minni gott.

- Trupulleikin er nokk, at vit hava gjørt eina professionella meting av nøkrum, sum fólk vanliga knýta nógvar kenslur at. Og tað kann næstan bara føra til misskiljingar. Tí er tað so ótrúliga umráðandi, at fólk innan hetta øki eisini læra seg at skilja ímillum tað reint fakliga og tað kensluliga, heldur Katrina í Geil.

- Møguliga verður tað ein torført uppgáva, tí onkursvegna tykist tað „óføroyskt" at seta hatta markið - serliga tá tað ræður um føroyskt handverk, har man ofta fær eitt herðaklapp fyri at duga so væl at kopiera, grunar Anna Mortensen.

- Í grundini hevur tað eisini við sær, at fólk ikki av álvara læra at virðismeta hetta handverkið, og tað er ótrúliga spell, heldur Katrin Bonde

### Einans faklig atlit

Tí var tað eisini heilt avgerandi fyri dómsnevndina ikki at taka onnur atlit yvirhøvur enn tey strangt fakligu, har tær mettu um hugskot, kanning, proportiónir, handverk og visjón. Út frá hesum hava tær orðað eina drúgva grundgeving fyri metingini av hvørjum einstøkum avriki, har tær hava víst á bæði styrkir og veikleikar. Og dómararnir vóna framvegis, at luttakararnir kunnu brúka hesar grundgevingarnar, hóast tær beint nú tykjast druknaðar í hvassa kjakinum um endaliga úrskurðin.

- Tað er nokkso hugstoytt, at ongin enn av álvara hevur gjørt viðmerkingar til sjálvar grundgevingarnar. Út frá teimum havi eg í øllum førum ilt við at trúgva, at fólk eru púra ósamd við okkara metingum, sigur Anna Mortensen

-- Um vit ikki tola fakligar metingar frá øðrum, so mennast hvørki vit ella fakið sjálvt. Í síðsta enda er spurningurin, um vit vilja fakinum væl. Frá okkara útbúgvingum og royndum hava vit allar góða venjing í at meta um stryrkir og veikleikar í ymsum designum. Og vit eru sanniliga eisini vanar við sjálvar at verða mettar um og fáa at vita, hvørji av okkara egnu avrikum eru brúkilig í mun til krøvini í eini uppgávu, minni Katrina í Geil á.

> *Føroyskt handverk er eitt fak, har øll halda seg duga. Tí verða tey, sum veruliga duga, ofta fatað sum arrogant*
>
> *Katrin Bonde*

Sosialurin